# ÚTSØLAN ENDAR
## Gerið kvetti fríggjadagin!

Ullint skjúrt, bundin 98,-

Jogging sett 198,-

Ullint turriklæði í ymiskum litum nú 198,-

T-shirt í ymiskum litum 98,-

Gardin restir nú -50% av útsøluprísinum

Mynstrut gardintoy frá kr. 20,- pr. mtr

Trussur 3 pør 95,-

...og mangt mangt annað

Skálabúðin
Dr. Jakobsensgota 21 - Tel 315315


# Marknaðarfólk

STARV sosialurin

Ert tú fyrikomandi, dugir tú væl at selja, ert tú álítandi, røkin og dugur at arbeiða sjálvstøðugt, so ert tú júst tann persónurin, sum vit leita eftir.

Til marknaðardeild okkara søkja vit eftir starvsfólki, sum kann vera viðvirkandi til framhaldandi at menna inntøkugrundarlag okkara, og sum í ávísan mun eisini kann átaka sær leiðsluuppgávur.

Lýsingarinntøkur eru ein týðandi partur av tilverugrundarlagnum hjá føroysku bløðunum, og tí leita vit støðugt eftir nýggjum hættum at menna hendan partin av fyritøkuni. Tí er tørvur á fólkum, sum duga at fáa og ikki minst arbeiða viðari við góðum hugskotum. Kundarøkt, account-management og telemarketing eru eisini arbeiðsuppgávur, sum vit framyvir koma at leggja enn størri dent á, og kemur starvið eisini partvíst at fevna um hesi øki.

Í samstarvi við starvsfelagarnar á marknaðardeildini verður tú eisini við í dagligu framleiðsluni av blaðnum. Herundir planlegging av lýsingarátøkum, temabløðum og lýsingartilboðum.

Løn verður ásett sambært avtalu.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so er bert at senda eina umsókn við frágreiðing um útbúgving og royndir til okkum. Ynskir tú at fáa meira at vita um starvið, ert tú sjálvandi eisini vælkomin at seta teg í samband við Jákup Mørk, fíggjarleiðara, á tlf. 311820. Tað ber sjálvandi eisini til at senda teldupost á jakup@sosialurin.fo

Umsóknarfreistin er 25. februar, og skal umstóknin saman við viðkomandi skjølum sendast til:

**Sosialurin**
**Jan Müller**
**Postsmoga 76**
**110 Tórshavn**

Vit eru alla tiðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blað. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Á Sosialinum starvast í dag uml. 25 fólk.


# Citroën Xsara

Um eingin bilur er í býti
fáa tygum ***ókeypis:***
4 sportfelgur
4 lamell-/píkadekk
1 komplett Dinitrol rustviðgerð
***- ella ein góðan avsláttur***

## Prestige 1,6I 16V 110HK
***Prestige útgerð***
6 airbags, aircondition, el-spegl v/hita, veloursetur, hita í setrum framman, fløguspælari v/6 hátalarum, tónaðar rútar, fjarðstýrt sentrallás, tokulyktir framman

**171.000,-**

## Elegance 2,0HDI 110HK
***Elegance útgerð, umframt Prestige***
Regnsensorar í forrútinum, síðuspegl, ið kunnu leggjast inn at síðuni, board teldu, leður róður

**195.000,-**

**Avmarkað nøgd**

*Vælkomin til*

CITROËN
**Ivan Johansen Bilar**
***www.ivan.fo***




# LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

## Akfør

**TIL SØLU**
Alufelgur 4 stk. 16" 205-50-R16. Holavstand 4 x 100. Hava 5 egern. Gearkassi til Nissan Sunny B12 til søluvi fyri 700 kr.
*Tlf. 722880 ella 422880*

**SPORTFELGUR TIL SØLU**
4 stk. 15" sportfelgur uttan dekk. Hava 5 egern, holavstand 4 x 100, 1.000 kr.
*Tlf. 722880 ella 422880*

**NISSAN SUNNY 1.4 LX**
bláur, árg. 92. Er í góðum standi. Selst um hóskandi boð fæst.
*Tlf. 222615 eftir kl. 17*

**4 NÝGGJ PÍKADEKK**
av slagnum Goodyear Ultragrip til sølu. 4 14" felgur til Volvo 240 bíliga til sølu.
*Tlf. 252072*

**HONDA CIVIC TIL SØLU**
Honda Civic 1.4 ls, árg. 10.97, km.: 73.000, til sølu.
*Tlf. 253923*

**FORD ESCORT**
Til sølu sum eykalutir fyri 2.000 kr. Árg. '89. ringi eftir kl. 17.
*Tlf. 223943 ella 313943*

**MITSUBISHI LANCER 1500 GLX**
árg. 88 er til sølu fyri kr. 1.500,00 hevur ongar plátur.
*Tlf. 314278*

**TOYOTA COROLLA TIL SØLU**
árg. 87, bilurin hevur nýggja kobling, nýtt stýrisystem, nýggjar bremsislangur og stoytdoyvarar framman. Til sølu fyri 16.000 kr.
*Tlf. 252990 ella 312146 eftir kl. 18*

**HONDA CIVIC 1.4**
árg. 88, økonomiskur og í góðum standi til sølu.
*Tlf. 441800 ella 441801*

**TAKBOKS/SKÍBOKS**
ynskist til keyps fyri sámuligan prís.
*Tlf. 219125*

**TIL SØLU**
4 felgur til VW Golf til sølu.
*Tlf. 225398*

**SPORTFELGUR**
4 sportfelgur til Toyota til sølu. Nýggj vetrardekk eru á felgunum.
*Tlf. 225398*

**TIL SØLU**
VW Golf stationcar, diesel, bíliga til sølu. 7 ára gamal, koyrt 172.000 km.
*Tlf. 421466*

**TIL SØLU**
Nissan Patrol 3.3 TD árg, 86 bíliga til sølu. Deilir til Subaru árg. 88 til sølu. Deilir til Ford Fiesta árg. 87-89 til sølu.
*Tlf. 283753*

**BMW 318i BAVARIA TIL SØLU**
Reyður BMW Bavaria frá 1992 til sølu. Bilurin er í sera góðum standi, hevur koyrt 185.000 km, mest í Týsklandi. Bilurin er sera góður at koyra, hevur klimaanlegg, centrallás, abs, servo, Pioneer fleguspælara, er á píkadekkum. 17" Titanium sportsfelgur við dekkum fylgja við. Ring ella maila til Bill Mc. Leod Jacobsen
*á tlf. 218022 ella e-mail mcleod@post.olivant.fo*

**VETRARDEKK**
4 dekk á felgum stødd 185/65 R15 til sølu fyri 1500 kr.
*Tlf. 228408*

**TOYOTA LANDCRUISER TIL SØLU**
HJ60, árg. 85, nýsýnaður.
*Tlf. 281730*

**TIL SØLU SUM EYKALUTIR**
Toyota Corolla 87, sær gott út og hevur góð píkadekk.
*Tlf. 215107 eftir kl. 16*

**FORD ESCORT 1.3**
reyður, árg. 21/10-93, í góðum standi, til sølu fyri 30.000 kr.
*Tlf. 223055 best eftir kl. 17*

**NISSAN ALMERA 2.0 DIESEL**
til sølu. árg. 97, er vælhildin, í góðum standi, prísur kr. 75.000.
*Tlf. 224176*

**FORD SIERRA ST. CAR**
árg. 1987 til sølu. Sýnaður í 2002.
*Tlf. 318364*

**DEKK TIL SØLU**
Lítið brúkt píkadekk á felgum til sølu.
*Tlf. 448614*

**BILAR TIL SØLU**
Toyota Carina 2.0 L, árg. 90 og ein jeepur Toyota 4WD, Landcruiser. Báðir nýsýnaðir, bíliga til sølu.
*Tlf. 252865*

**SEAT CORDOBA**
Reyður Seat Cordoba, diesel, árg. sept. 1999 til sølu fyri 95.000 kr. Bilurin hevur havt ein eigara, hevur koyrt 102.000 km. Sportfelgur fylgja við.
*Tlf. 217968 ella 447962*

**PEUGEOT 306 1.6 TIL SØLU**
Nýlakeraður, 2 sett sportfelgur 15" og 16" - 60.000 km., árg. 11/97, í sera góðum standi.
*Tlf. 212286 ella 373206*

**PÍKADEKK TIL LASTBIL**
6 stk. góð Good Year píkadekk stødd 285/70R19,5 til sølu.
*Tlf. 213577*

**TOYOTA CAMRY 2.0 GLI**
Full time 4 wd, árg. 12/88, nýsýnaður, nýggj dekk, aircondition, el-rútar, powerstýring, sentrallás, bíliga til sølu.
*Tlf. 213577*

**TOYOTA CARINA II**
til sølu, aut. gear, árg. 85, góð píkadekk fylgja við, til sølu fyri 5.000 kr.
*Tlf. 224304 ella 449414*

**FORD ESCORT SAVOY**
árg. 87 koyrir væl, nýtt útstoyt, kølivatnspumpu, kammreim kann nýtast sum reservadeilir. Hugsandi prísur 2.000 kr.
*Tlf. 218494 eftir kl. 17 448494*

**FELGUR**
Fýra felgur til Opel til sølu fyri 500 kr.
*Tlf. 451293*

**BILDEILIR TIL SØLU**
Bildeilir til Honda Civic '87-'89 modellið. 4 sett av komplettum hurðum, dynamo, startari, tendring, forlyktir, baklyktir, komplett útstoyt + forhjelmur, baklúka og mangt annað.
*Tlf. 221589*

## Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
***(set X)*** undir teiginum:

❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Brævaskifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ .....

***Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12⁰⁰, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar. Sosialurin tekur ongan ábyrgd av møguligum villum.***

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……...

»Lýsingartorgið«
**Sosialurin**
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki

## Amboð

**BORÐSAG TIL SØLU**
samansett, men ongantið brúkt til sølu fyri 6.500 kr. Nýprísur 9.000,-
*Tlf. 375133 eftir kl. 19*

**LYFTIVOGNUR**
til plattar til sølu fyri 3.000 kr.
*Tlf. 224910*

**TIL SØLU**
Brúktur XA40 kompressari á hjólum, vælegnaður til 1 borihamar ella 1 brekkara. Brúktur arbeiðsskúrur 20' kontainari innrættaður. Brúktar A.C. maskinur sum bora og brekka.
*Kaj Andreasen, tlf. 315600*

## Arbeiði

**ARBEIÐI SØKIST SUM BARNAGENTA**
Eg ynski mær arbeiði at ansa/heinta barn úr dagstovni aftaná skúlatíð. Elana 12 ár.
*Tlf. 319169/266593*

**LÍNUMAÐUR SØKIR ARBEIÐI**
Hevur royndir í línuarbeiði. Alt hevur áhuga innan fyri línuarbeiði.
*Allan Poulsen, Tlf. 423614*

**VASKIARBEIÐIÐ SØKIST**
HF-lesandi søkir vaskiarbeiði eftir skúlatíð, nakrar dagar um vikuna. Havi royndir. Ring
*Tlf. 229699/361560*

## Barnaútgerð

**BRITAX BILSTÓLUR**
850 kr. Nýprísur 1250 kr. BabyDan beriseli 250 kr. 8 mðr. gamalt.
*Tlf. 229951*

**BILBARNASTÓLUR**
Ein Chicco bilbarnastólur, 0-10 kg, til sølu fyri 300 kr.
*Tlf. 310039 e. kl. 18*

**YNSKIST**
Hevur nakar ein føroyskan skinnposa til koyristól at selja mær?
*Tlf. 220284*

## Bátaútgerð

**SNELLUR TIL SØLU**
2 stk. BJ 5000 snellur. fullaut., elektriskar, til sølu.
*Tlf. 314546 ella 214646*

**SPEEDBÁTUR YNSKIST TIL KEYPS**
uml. 15 fót bátur til páhangsmotor ynskist, uttan motor, bíliga.
*Tlf. 220033*

**TIL SØLU**
ein 24 volt kaffimaskina so at siga óbrúkt og ein lítið brúkt 2 ára gomul hondsnella til sølu.
*Tlf. 457860 ella 224496*

**GOGGUR**
Goggur til sølu.
*Tlf. 226661 ella 421585*

**VÁGASNELLUR**
5 stk. vágasnellur fullaut. hydraul. bíliga til sølu.
*Tlf. 372312 ella 287312*

## Bingo

**FRÁ STRÁLUNI**
Gott bingo verður á Strondum sunnudagin 16. febr. kl. 16. Burturlutað verður m.a. turt kjøt og gávukort á 1.500 kr. Eisini verða lukur at lata upp.
*Strálan*

**GOTT BINGO**
verður í Framtíðini onskvøldið 19. feb. kl. 19.00. Nógvir góðir vinningar. Full pláta 300 kr. Á lutaseðli 1.000 kr. olju (Shell).
*Vágs Pensionistafelag*

**GOTT BINGO**
verður í Eydnuni sunnudagin 16. feb. kl. 16.00. Nógvir góðir vinningar m.a. ein Apex flogferðaseðil.
*9.a á Felagsskúlanum á Øyrabakka*

**BINGO**
Gott bingo verður í TB-húsinum tórskvøldið 13. febr. kl. 19.00.
*Tvøroyrar Bóltfelag*

**KAGGIN**
Gott bingo verður leygarkvøldið 15. feb. kl. 19.00. 15 vinningar á lutaseðli m.a. 2 gávukort á 500 kr og 3 gávukort á 1.000 kr. Eisini verður spælt bingola og 20 kr. spæl.
*Kaggin*

**BINGO**
verður í Felagslonini í Fuglafirði, hóskvøldið 13. februar kl. 19.30.
*Eldrafelagið Borgin*

**HEIMABINGO**
hjá 6. fl. í Vágs skúla. Hesi nr. hava vunnið: 373764, 374005, 373413, 373472, 447579, 263012, 374737, 373647, 373442. Takk fyri stuðulin.
*6. flokkur*

**BINGO ÚTSETT**
Bingo, sum skuldi vera í Roynhøllini týskvøldið 11. februar er útsett.
*8. flokkur í Hvalba*

## Burturm. /funnið

**HJÁLP MÆR ONKUR**
Mín elskaði Rocky hevur verið burtur síðan 6. februar. Hann er stríputur um halan, svartur og hvítur og er ein frensur. Hann hevur onga ketu. Hann býr í Villumsgotu.Um onkur hevur sæð hann
*ring 321712 ella 265712*

## Býli

**PAR YNSKIR ÍBÚÐ**
Friðarligt par ynskir íbúð í Tórshavn, roykja ikki og fara væl um.
*Tlf. 222106*

**HÚS Í SANDAVÁGI**
til sølu um hóskandi boð fæst.
*Tlf. 212530 best eftir kl. 17*

**HÚS Í SØRVÁGI TIL SØLU**
Nýinnrættaði hús í Sørvági til sølu um hóskandi boð fæst. Eru sum nýggj.
*Tlf. 332614 og 225090*

**HÚS/ÍBÚÐ YNSKIST Á TVØROYRI**
Familja v/ 4 børnum ynskir hús/-íbúð á Tvøroyri skjótast gjørligt! Vit fara væl um.
*Tlf. 321591 ella 252711*

**VERILSIR TIL LEIGU**
Verilsir mitt í býnum til leigu til friðarlig fólk við atgongd til køk og bað, egin inngongd.
*Tlf. 317301 eftir kl. 17*

**YNSKIST TIL LEIGU**
Hús ella íbúð ynskist til leigu í Gøtu ella nærhendis.
*Ring 0045 20400017*

**HÚS TIL LEIGU**
Hús til leigu á Toftanesi í Leirvík. Tríggjar hæddir, á loftinum eru 2 kømur og loftsstova, í miðhæddini er køkur, stova, gongd, wc/bað og durur og í kjallaranum er hjúnarúm, wc/bað, vaskirúm, fýrrúm, gongd og stórt kjallararúm. Húsini liggja við blindan veg, í barnavinarligum umhvørvi og beint við Statoil. Ring ella maila til Bill og vit avtala depositum og leigupris. Bill M. Jacobsen tlf. 218022 ella
*e-mail mcleod@post.olivant.fo*

**VIT ERU EITT UNGT PAR**
við einum barni, ið leita eftir íbúð í Havn skjótast gjørligt. Vit drekka og roykja ikki, eru røkin og gjalda til tíðina. Íbúðin má helst ikki kosta meir enn 4.500,- við el og hita. Um tit kunnu hjálpa okkum so vinarliga ring
*tlf. 256396 Vivie ella 222338 Báður*

**KAMAR TIL LEIGU**
við atgongd til matgerð, wc og bað, egin inngongd.
*Tlf. 312026*

**YNSKIST**
hús ella íbúð ynskist til leigu í Vágum (helst Miðvági).
*Tlf. 267926*

**HJÆLP!!! HJÆLP!!!**
Vi er en familie på 5, 2 voksne, 3 børn. Vi ønsker at leje et hus på Vágunum. Vi er interesseret i alt.
*Ring 29 219931 eftir kl. 18 dk tid, Tina*

**KAMAR ELLA LÍTIL ÍBÚÐ**
ynskist til ein av okkara starvsfólkum. Má hava atgongd til køk og bað.
*Profa Gólv tlf. 322494*

**BOLIG SØGES**
til en person i Klaksvík ella omegn af stabil og fredelig lejer. Ryger ikke, drikker ikke. Har ingen husdyr.
*Tlf. 458028, Tordís*

**SKULU VIT BÝTA?**
Hevur tú eini hús í miðbýnum, so havi eg eina íbúð í Berjabrekku við sera góðum útsýni.
*Tlf. 311230 ella 511230*

**ÍBÚÐ SØKIST**
Par við 2 børnum søkja íbúð í Havnar kommunu. Má hava 2 kømur. Vit roykja og drekka ikki.
*Tlf. 320624 ella 229951*

**ÍBÚÐ YNSKIST**
Hey! Vit eru eitt ungt par, ið ynskja íbúð í Havn. Bæði hava fast starv, fara væl um og gjalda stundisliga.
*Tlf. 224211*

**ÍBÚÐ YNSKIST**
Ungt par ynskir íbúð í Klaksvík frá august og árið út fyri sámuligan prís. Fara væl um.
*Ring 224077 ella 256219*

**TIL LEIGU**
Hús í Vágunum til leigu til fólk ið fara væl um og ikki roykja. Skrivi til Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn
*Bill. mrk. 811a*

## Dansur

**DANSUR Í SØRVÁGI**
Góður gamlamannadansur við svingandi dansitónleiki verður leygarkvøldið 15. febr. Audio spælir.
*S.Í.*

**EYSTUROYAR DANSIFELAG**
Vit hava hugnakvøld friggjakvøldið 21. februar kl. 20.00. Kostnaður 100 kr. Tekning á tlf. 443060 í seinasta lagi mánakvøldið 17. febr.
*Nevndin*

## Dýr

**SEYÐA- OG NEYTAKLIPS**
Seyða- og Neytaklips bíliga til sølu. Nógv bíligari enn tú kanst fáa tey vanliga. Ring og hoyr nærri
*Tlf. 315230- 215230*

**GOLDEN RETRIEVER**
Ein sera fitt 4 mðr. Golden Retriever tik manglar eitt heim. Meiri fæst at vita á
*tlf. 315191 - 215191*

**HEY DJÓRAVINUR!**
Vilt tú eiga meg, eg eri ein so fittur frensur, eri 10 vikur, eti, drekki og eri reinligur. Svartur og hvítur.
*Tlf. 318543*

**HYGG HER!!!**
Er tað nakar í Havn, sum hevur angora-marsvín at geva/selja mær bíliga (eri góð við djór).
*Tlf. 265807*